tel. +298 363906 • fax 363901 • postboks 208

annar@logting.fo logting@logting.fo www.logting.fo

**Fra:** Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
**Sendt:** 23. januar 2019 15:08
**Til:** Anna Rein <annar@logting.fo>
**Cc:** John Zachariassen <jz@sev.fo>; Bogi Bendtsen <bb@sev.fo>; Terji Nielsen <tn@sev.fo>
**Emne:** Skriv til Vinnunevndina, Løgtingsmál nr. 75/2018

Til Vinnunevnd Løgtingsins.

Vísandi til fundin í dag førdi SEV fram at senda viðmerkingar til uppskot Sambandsflokksins, Løgtingsmál nr. 75/2018: " Uppskot til samtyktar um sundurskiljing av netinum hjá SEV soleiðis, at netparturin verður ein sjálvstøðug eind".

Yvirskipað hevur SEV hesar viðmerkingar:

1. SEV er ikki ímóti broytingum. Broytingar skulu undirbyggjast og geva meining. Aðalendamálið í elveitingarlógini er, at elprísurin ikki skal vera hægri enn neyðugt og samstundis skal góðskan og veitingartrygdin vera í lagi. Broytingar eiga í minsta lagi at taka hædd fyri hesum.
2. SEV er fyri kapping. SEV virkar fyri fair kapping og brúkar aktivt kapping í dagligu virkseminum. Til gagns fyri kappingina útvegar SEV vindhagtøl, sum er við til at lækka gáttina hjá teimum, sum bjóða seg fram innan vindorkuframleiðslu. SEV luttekur í vindorkuútboðum fyri at tryggja góða kapping og lágar prísir.
3. Skal netparturin liggja í einari sjálvstøðugari eind, so skal hendan eindin eisini standa fyri veitingartrygdini. Í praksis merkir hetta, at sjálvstøðuga eindin skal fevna um netið, oljuverkini, vatnorkuverkini og komandi pumpuverk.

Meira ítøkiligt eru viðmerkingar gjørdar til sjálvt lógaruppskotið, hesar viðmerkingar ganga fram av viðfesta wordskjali.

Vinalig heilsan

Elfelagið SEV

Hákun Djurhuus, stjóri